# Chefkokkur

**Vit leita eftir einum kreativum, dugnaligum kokki, við áræði og hegni til fíggjarligt skynsemi.**

**Ert tú tann rætti, bjóða vit eitt arbeiði við føstum kørmum og góðum inntøkumøguleikum.**

**Sum kokkur fært tú - í tøttum samstarvi við leiðsluna - ábyrgdina av dagliga rakstrinum av køkinum, ger av mataskráum og fyriskipan av tiltøkum.**

**Fyri nærri kunning um starvið, ert tú vælkomin at ringja til:**

**Kára Hentze**
**212955**

RIO · BRAVO
RESTAURANT

RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67

TEAM85

---

Keypssamtøkan í Miðbýnum



## Brúkarakvøld um *Vistmeti*

### Vitan um rávøruna gevur borðgleði

Hóskvøldið 12. juli kl. 20 fer Katrine Terkelsen at halda fyrilestur um vistmeti. Katrine er útbúgvin á Suhrs Seminarium í Keypmannahavn sum bachelor í føðigóðsku og heilsu.

Fyrilesturin, sum verður í Keypssamtøkuni í Dr. Jakobsensgøtu, byrjar klokkan 20 við, at luttakararnir fáa vistfrøðiligt kaffi.
Síðani sigur Katrine frá í uml ein tíma, til høvi verður at smakka óteljandi sløg av vistmeti.

Høvi verður eisini at keypa vistfrøðiligar vørur heim við sær.

Atgongumerki (avmarkað tal) fáast fyri kr 20,- í breyðsøluni í FK Dr. Jakobsensgøtu.

***Føroya Keypssamtøka***
***Dr. Jakobsengøtu***

fk

---

# Shell sóknast eftir skrivstovufólki

**Starvið**
Talan er um starv í umsitingini (bókhaldi og avgreiðslu) á Viðarnesi í Havn.

Í løtuni er arbeiðsøkið í høvuðsheitum:

- Vøruskráseting og tollavgreiðsla
- Bókingar og avstemmingar
- Kundaavgreiðsla, ordramóttøka o.a., serliga um telefon
- Stovnan av nýggjum avtalum og kundum
- Meirsøla av vørum og tænastum hjá Shell
- Aðrar umsitingarligar uppgávur

Føroya Shell er í ferð við at umskipa fyrisitingina. Lyklaorðini í hesum sambandi eru betri og sterkari kundatænasta og fyrisiting, har dentur verður lagdur á eitt mennandi og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi og á førleikamenning. Í sambandi við umskipanina av fyrisitingini kunnu koma broytingar á arbeiðsøkjunum, og verður hetta tá gjørt við støði í førleikanum hjá tí einstaka. Talan er um fulltíðarstarv, men ávísir møguleikar eru at arbeiða niðursetta tíð.

**Tann, vit leita eftir**
Tað er ein fyrimunur, men ikki ein treyt, at tú hevur HH-prógv, studentsprógv ella annað samsvarandi, umframt skrivstovuútbúgving. Tú hevur royndir í skrivstovuyrkinum, ert fyrikomandi, hevur lætt við at samskifta, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir við nærlagni. Tað er fyrimunur, um tú hevur royndir í kundaavgreiðslu og dugir at arbeiða við EDV.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum og við møguleikum fyri persónligari og yrkisligari menning. Talan er eisini um góða løn við eftirlønarskipan í samsvari við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meiri um hetta starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Johnni Poulsen, fíggjarleiðara, telefon 34 74 00. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til P/F Føroya Shell, att. Johnni Poulsen, Postboks 188, 110 Tórshavn, ella sum teldubræv til shell@shell.fo
Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin, 11. juli.

REPROZ

**Hugsar tú um eina betri framtíð?**
**www.shell.fo**

**Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 8 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Telefon 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo**